# Sterkar svenskar sakir í KLIPP

**Tveir dagar eftir altjóða kvinnudagin sýnir KLIPP, filmsfelag Norðurlandahúsins, svenska filmin Lilja 4-ever. Filmurin er sterkur og viðkomandi - eisini hjá føroyingum**

FILMUR
*Filmsfelagið Klipp*

Leikstjórin Lukas Moodyson hevur frammanundan leikstjórnað tveir teir bestu, svensku filmarnar síðstu árini, Tilsammans (2000) og Fucking Åmål (1998), og aftur hesaferð tekur hann fólk á bóli. Lilja 4-ever viðger eitt viðkomandi og aktuelt evni, handil við kvinnum, sum eisini hevur verið uppi og vent hjá okkum síðstu tíðina.

Filmurin er um 16 ára gomlu Lilju, sum býr einastaðni í gamla Sovjettsamveldinum. Alt er steðgað, alt forfellur og øll hava útferðarlongsul. Mamman rýmir undan Lilju til USA, og alt tykist vónleyst, til hon hittir vakra prinsin Andrei, sum birtir nýggja vón. Hann billar henni inn, at í Svøríki, har hann arbeiðir, er eitt betri lív hjá baltiskum kvinnum. Og har byrjar vónleysa søgan.

Lilja endar óviljað í skøkjulevnaði og misnýtslu. Filmurin er ógvuliga dapur, vónleysur og konsekventur. Tað er bara ein orsøk til, at tú heldur filmin út, og tað er, at tú heldur við Lilju, sum er ein sjálvstøðug og viljasterk ung genta.

Filmurin hevur elvt til nógva umrøðu í Norðurlondum, har politikarar og onnur við valdi hava fingið eyguni upp fyri veruleikanum: Ungar kvinnur úr fátøkum korum eru vorðnar ein handilsvøra hjá eysturlendsku mafiuni.

At filmurin eisini er viðkomandi fyri føroyingar er eingin ivi um. Føroysku kvinnufeløgini hava viðgjørt trupulleikan, bæði av samhuga við sínar eysturlendsku systrar, og tí okkurt líknandi hevur nærkast Føroyum.

Lilja 4-ever verður sýndur mikukvøldið 10. mars klokkan 20.00 í Norðurlandahúsinum.






# Heini á Borg er formaður



**Leygardagin hevði Føroya Ellisakfør aðalfund, har nýggj nevnd varð vald**

ELLISAKFØR
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 6. mars hevði Føroya Ellisakfør aðalfund. Fyri vali stóðu tríggir nevndarlimir, Ingi Justinussen, sum hevur verið formaður seinastu tvey árini, Johan Beder, skrivari, og Hans Jørn Nielsen, kassameistari. Eisini bað Rúni Nielsen um at verða loystur frá sum nevndarlimur.

Ingi Justinussen og Johan Beder bóru seg undan afturvali.

Nevndin í Føroya Ellisakførum sær nú soleiðis út:
Heini á Borg, formaður
Petur Johannessen, næstformaður
Eirikur Lindenskov, skrivari
Hans Jørn Nielsen, kassameistari
John William Old, nevndarlimur
Eykalimir eru:
Magnus Gunnarsson
Helgi Magnusarson

Føroya Ellisakfør er felag fyri tey, ið hava alsk til gamlar bilar og motorsúkklur. Felagið varð stovnað í 1992, og hevur til endamáls at virka fyri áhugamálum hjá hesum málbólki.

Felagið hevur felagshøli yvir við Strond 22 í Havn, men leigar eisini gamla vatnbrunnin við Gráastein í Havn frá Tórshavnar Kommunu. Brunnurin er settur í stand soleiðis, at hann kann hýsa akførum undir tryggum – og turrum – umstøðum. Ætlanin við brunninum er at seta á stovn eitt tekniskt fornminnissavn.

Føroya Ellisakfør arbeiða eisini við at savna føroysku bilasøguna, sum byrjar í Havn tann 6. mai í 1922, tá fyrsti bilur kom til Føroya. Tað var tá Johannes Olsen og Júst Sivertsen keyptu ein Ford TT lastvogn frá Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen, sum høvdu smiðju í Quillingsgarði í Havn.

Felagið gevur eisini út blaðið Hjólið, ið kemur út fýra ferðir um árið.



